Viðhvørt hugsi eg eisini um, hvat onnur børn munnu hugsa – meðan tey liggja og bíða

# TÁ IÐ VAKSIN FREMJA ÁGANG

## – UM KYNSLIGAN ÁGANG MÓTI BØRNUM OG UNGUM

2018



KRIS | RÁÐGEVING FYRI SEKSUELT MISBRÚKT

Red Barnet

# INNIHALD





## Hvat er kynsligur ágangur?


3 Vitan er sterkasta vápnið
6 Tann revsiverdi ágangurin
6 Tann sálarligi ágangurin
7 Hevur hann nortið við teg?
7 Serligar vandastøður
7 Alnetið – eitt sjálvstøðugt stað at møtast
8 Myndir av kynsligum ágangi móti børnum
8 Ivasamt, hvussu nógv
9 Tann óhugnaligi maðurin niðri í nummar 10
9 Hvørji eru tey pedofilu?
9 Hebefil – eitt hugtak, vit ikki hoyra um
9 Kvinnur kunnu eisini skemma
10 Tá ið børn skemma børn
10 Tað barnsliga kynslívið
11 Kynsligu tannáringarnir
12 Hví hendir kynsligur ágangur?
12 Eingir skemmarar eru líka
12 Ein samfelagstrupulleiki?
13 Børn í vandaøki
13 Menningartarnað
13 Okkara lítla loyndarmál
13 Stig í 'groomingini'
14 Eitt fet á rættari leið
15 Góð ráð til tín, sum ert um børn og ung
16 Her kanst tú fáa hjálp og ráðgeving í Føroyum


”

Viðhvørt hugsi eg eisini um, hvat onnur børn munnu hugsa – meðan tey liggja og bíða


Red Barnet er danska deildin hjá Save the Children – heimsins størsta óhefta barnarættindafelagsskapi. Red Barnet stríðist fyri rættindum hjá børnum og veitir børnum og ungum í vandabólkum bæði í Danmark og úti í heimi bráðfeingis- og langtíðarhjálp.

**Tekstur:** Betina Rangstrup
**Ritstjórn:** Kuno Sørensen, Louise Dyring, Marianne Eriksen og Janne Tynell
**Myndir:** Carsten Ingemann/DAS BÜRO og Jan Grarup/DAS BÜRO
**Snið og framleiðsla:** Westring kbh

**Útgevari: Red Barnet 2011**
**Dagførd útgáva:** 2014
**Føroysk útgáva:** KRIS, 2018
**Málslig viðgerð:** Sprotin
**Prentframleiðsla:** Sprotin



**Red Barnet**
Rosenørns Allé 12
1634 København V
Telefon 3536 5555
redbarnet@redbarnet.dk
www.redbarnet.dk


ISBN 978-99972-1-301-3

# VITAN ER STERKASTA VÁPNIÐ

Kynsligur ágangur móti børnum er alsamt meiri undir sjóneykuni hjá miðlunum. Tað er gott, tá ið hugsað verður um stríðið ímóti ágangi – men als ikki nóg mikið. Bæði foreldur og fakfólk, sum dagliga eru um børn, hava tørv á vitan og amboðum fyri at vera før fyri at veita børnunum ta verju, tey hava rætt til.

Vitan er sterkasta vápnið, tá ið støða verður tikin til kynsligan ágang fakliga og persónliga – bæði í sambandi við tað fyribyrgjandi arbeiðið, tá ið illgrunin er har, og í einum heilt ítøkiligum máli.

Í hesum hefti fært tú eina breiða kunning um, hvat kynsligur ágangur móti børnum er: Heftið er tað fyrsta av trimum, ið eru ætlað vaksnum. Hini bæði heftini seta sjóneykuna á, hvat ið er at gera, tá ið illgrunin um ágang kyknar, og tá ið illgrunin verður til eitt ítøkiligt mál.

Red Barnet hevur tikið stig til útgávuna við vón um at stuðla foreldur og fakfólk í stríðnum ímóti kynsligum ágangi móti børnum.

Jonas Keiding Lindholm
aðalskrivari hjá Red Barnet


edward
twilight



Brádliga gjørdist kærleiki
hansara heilt skeivur.
Hann mussaði meg, sum
var eg vaksin

# Hvat er kynsligur ágangur?

## TANN REVSIVERDI ÁGANGURIN

**Sambært revsilógini kann kynsligur ágangur móti børnum og ungum vera:**

- Samlega ella annað kynsligt samband við børn undir kynsliga lógaldurin (<15 ár)
- Samlega ella annað kynsligt samband millum ung undir 18 ár og eldri familju-limir/systkin (blóðskemd)
- Samlega ella annað kynsligt samband millum ung undir 18 ár og ættleiðingar-foreldur, fosturforeldur ella aðrar uppalarar ella lærarar
- Samlega ella annað kynsligt samband við ung undir 18 ár fyri pening (skøkju-virksemi)
- Nýtsla av børnum og ungum undir 18 ár til pornoframleiðslu
- Blygdanarskemd móti børnum og ungum undir 18 ár (nerting, nektan ella fúlur málburður)
- Neyðtøka av børnum og ungum undir 18 ár*

## TANN SÁLARLIGI ÁGANGURIN

Aftrat tekstinum í lógini átti kynsligur ágangur eisini at verið allýstur við støði í teimum sálarligu avleiðingunum. Til dømis er tað sambært lógini revsivert, um ein, sum er 14 ár, hevur kynsliga samveru við sínum 21 ára gamla unnusta, hóast hetta út frá einum sálarligum sjónarhorni ikki kann kallast kynsligur ágangur. Hesi bæði ungu kunnu vera forelskað og hava kynsliga samveru, uttan at talan er um ein 21 ára gamlan, ið misbrúkar ein ómyndigan persón. Í slíkari støðu er talan tí ikki um sálarligan ágang. Harafturímóti kann ágangur, sum ikki er revsiverdur, vera sálar-ligur ágangur. Til dømis um ein 21 ára gamal maður knýtir vinaband við 15 ára gamla gentu ella drong á alnetinum fyri seinni at yvirtala hana ella hann til kynsliga samveru. Hóast kynsliga samveran í hesum føri ikki er revsiverd, kann tað sanniliga kennast sum sálarligur ágangur hjá tí 15 ára gamla.

*revsilógin §§ 222 – 236. www.logir.fo



”

## At síggja til var pápi ein virðiligur maður. Hann var eitt tvímenni.

### HEVUR HANN NORTIÐ VIÐ TEG?

Kynsligur ágangur hevur ikki altíð likamligt samband við sær. Kynsligar gerðir uttan likamligt samband kunnu bæði vera revsiverdar og koma undir sálarligan ágang.

**Ikki-likamligur ágangur kann vera at:**

- Vísa barni pornografiskt tilfar
- Nekta seg framman fyri barni
- Noyða barn at hyggja at kynsligum gerðum
- Taka myndir/film av barni í kynsligum støðum
- Lúra eftir barni
- Siga barni frá kynsligum dreymum

### SERLIGAR VANDASTØÐUR

Eingi nágreinilig hagtøl eru fyri, hvar mestur kynsligur ágangur verður framdur. Men tað er greitt, at ein lutfalsliga stórur partur fer fram í familjuni ella í nærumhvørvinum, og ein nógv minni partur fer fram á dagstovnum, skúlum ella í ítróttar- og frítíðarhøpi. Tað kann tó vera ein falskur tryggleiki at tosa um serligar vandastøður í hesum samanheingi. Kynsligur ágangur kann koma fyri allastaðni, har børn og vaksin eru saman, og viðhvørt hendir tað, har ein minst væntar tað. Kynsligur ágangur kann eisini koma fyri, uttan at vaksin fólk eru hjástødd, t.d. tá ið børn og ung gera seg kynsliga inn á hvørt annað.

### ALNETIÐ – EITT SJÁLVSTØÐUGT STAÐ AT HITTAST

Talgildu miðlarnir og alnetið hava latið upp fyri nýggjum møguleikum, eisini tá ið talan er um kynsligan ágang. Nógv vaksin fólk hava trupult við at taka støðu til netbornu sosialu tilveruna. Tey sosialu treffini og vinaløgini, sum t.d. spretta í kjattrúmum, mennast tí ofta, uttan at vaksnir umsorganarpersónar eru hjástaddir. Kynsligur ágangur gjøgnum talgilda samskiftið kann bæði koma fyri ímillum børn og ung, eins og hann kann koma frá vaksnum fólki, sum hevur hug á børnum ella ungum. Kynsligi ágangurin kann vera tilvildarligur, t.d. gjøgnum tilvildarlig treff, har farið verður um mørk við gerðum og/ella fúlum málburði. Men tað kann eisini koma fyri í einum vinalagi, sum er uppbygt í langa tíð, har ein skemmari at enda fær ofrið at játta at vera við í ymiskum kynsligum gerðum. Hetta kann henda, um avgjørt verður at hittast „in real life“, men tað kann eisini gerast ígjøgnum vevmyndatólið á telduni. Ein skemmari kann nýta tilfar, sum er tikið upp við





vevmyndatólinum, til at skemma uppaftur meir t.d. við at almannakunngera myndir/filmar á alnetinum ella við at senda tilfarið til vinir hjá ofrinum. Hóttanin um almannakunngering kann nýtast í sjálvum sær til at noyða ofrið at taka fleiri stig í kynsliga sambandinum.

## MYNDIR AV KYNSLIGUM ÁGANGI MÓTI BØRNUM

Tað er ikki loyvt at útluta pornografi og ósømiligar myndir við børnum og ungum undir 18 ár. Men við nýggju talgildu myndatøknini og teimum víðfevndu møguleikunum fyri útluting á alnetinum eru myndir við kynsligum ágangi móti børnum tíverri vorðnar ein stórur og vaksandi ídnaður. Ongantíð áður eru so nógvar pornografiskar og erotiskar myndir av børnum framleiddar sum nú, og mett verður, at vaksin fólk gjalda upp í eina milliard amerikanskar dollarar um árið fyri at síggja børn verða kynsliga misnýtt (Red Herring 2002). Nógvir av størstu framleiðarunum av barnapornografi hava sæti í londum við vánaligum eftirliti, so sum Russlandi og øðrum londum í Eysturevropa, men brúkarar eru í øllum heiminum. Red Barnet hevur síðan 1998 samstarvað við Ríkisløgregluna í stríðnum ímóti barnapornografi og hevur tikið ímóti fráboðanum um myndir av børnum á alnetinum. Les meira á redbarnet.dk/anmeld

## IVASAMT HVUSSU NÓGV

Eins og eingi nágreinilig tøl eru fyri, hvar kynsligur ágangur fer fram, eru heldur eingi tøl fyri, hvussu nógv børn og ung eru fyri kynsligum ágangi. Nógvur kynsligur ágangur verður ongantíð fráboðaður, og tí ber ikki til at meta um veruligu mongdina bara við tølunum hjá kommunum og løgreglu. Fleiri kanningar eru gjørdar við spurnabløðum, men her kann vera trupult at skilmarka, nær talan er um kynsligan ágang. Í kanning við spurnabløðum av einum 9. flokki svara 2% av dreingjunum og 7,8% av gentunum, at tey høvdu havt kynsligt samband við eitt vaksið fólk, áðrenn tey høvdu fylt 15 ár.* Av teimum svaraðu bert 12% av dreingjunum og 28,5% av gentunum, at tey upplivdu tað sum kynsligan ágang. At kynsligur ágangur javnan er treytaður av einari persónligari meting hjá ofrinum, er eisini ein orsøk til, at nágreinilig tøl eru trupul at útvega.

**Ein vaksin varð skilgreinaður sum ein, ið var 5 ella fleiri ár eldri enn tann ungi sjálvur*

**Í einari stórari danskari spurnakanning** av næmingum í 9. flokki søgdu 8,5% av dreingjunum og nærum 30% av gentunum seg í einum eitt árs tíðarbili at hava upplivað, at fremmand fólk høvdu biðið tey um – at senda ónærisligar myndir av sær sjálvum út á alnetið. Ein stórur partur av bæði gentum og dreingjum (>40%) høvdu hitt fólk í veruleikanum eftir fyrst bert at hava tosað við tey á alnetinum. 3,5% av dreingjunum og 2,3% av gentunum høvdu í hesum sambandi havt óhugaligar kynsligar upplivingar. (Kelda: Unges Trivsel 2008)

> Í fyrstani skuldi eg nøkta hansara tørv við hondini og munninum. Hann hevur altíð brúkt meg sum eina sjálvfylgju

## TANN ÓHUGNALIGI MAÐURIN NIÐRI Í NUMMAR 10

Hugmyndin um tann eyðkenda kynsliga skemmaran, sum t.d. barnalokkaran við feittutum hári og í knarvakoti, samsvarar sjáldan við veruleikan. Tað er ein sannroynd, at teir sjáldan sleppa at vera saman við børnum og tí – sjálvt um teir vildu – ikki hava nógvar møguleikar at fremja kynsligan ágang. Í staðin mugu vit staðfesta, at vaksin, sum finna røttu løtuna at fremja kynsligan ágang móti børnum og ómyndigum, eru ein ógvuliga fjølbroyttur bólkur av menniskjum.

## HVØRJI ERU TEY PEDOFILU?

Pedofili er ein klinisk diagnosa, sum verður brúkt um vaksin, sum hava varandi kynsligan áhuga fyri børnum og bert fyri børnum. Hugmyndin verður javnan brúkt skeivt um øll vaksin, sum hava gjørt ella fara at gera seg kynsliga inn á ein ómyndigan persón. Í flest øllum tilburðum er talan ikki um eina óvanliga kynsliga sannføring, men aðrar sálarligar og sosialar umstøður, sum fáa ein vaksnan at gera seg kynsliga inn á børn. Ein villleiðandi nýtsla av hugtakinum pedofilur er ikki bara ørkymlandi, tá vit tosa um, hvat kynsligur ágangur móti børnum snýr seg um – tað er eisini við til at stigmatisera evnið. Tey allarflestu, sum fremja kynsligan ágang móti børnum, høvdu heldur viljað havt kynsligt samband við eitt annað vaksið fólk. Og nógv av teimum, sum hava fingið staðfest pedofili, liva við tí avvíkjandi kynsligu tráan uttan nakrantíð at gera seg inn á børn. Tað hevði verið til fyrimuns, um vit dugdu betur at skyna á einum pedofilum persóni og pedofilum ágangi, av tí at hesi bæði hugtøk ikki neyðturviliga hava nakað við hvørt annað at gera.

## HEBEFILI – EITT HUGTAK, VIT IKKI HOYRA UM

Sálarfrøðingar og læknar eru farnir at tosa um tørvin á at skilja ímillum hugtøkini pedofili og hebefili. Har tann pedofili, ella tann pedofili ágangurin, miðar eftir børnum, ið ikki eru kynsbúgvin, miðar tann hebefili, ella tann hebefili ágangurin, eftir børnum, sum akkurát eru vorðin kynsbúgvin, t.e. tannáringum.

Tað er umráðandi at skilja ímillum hesar báðar bólkarnar, tí teir virka á ymiskan hátt og skulu tí eisini fyribyrgjast og viðgerast ymiskt. T.d. er áhugin hjá tí hebefila ikki frávíkjandi lívfrøðiliga á sama hátt sum hjá tí pedofila, júst tí at ein tannáringur er kynsbúgvin. Áhugin er tó so frávíkjandi sálarliga og sosialt, tí talan er um áhuga fyri tí kynsliga óroynda og sálarliga óbúna tannáringinum, sum ikki fær verið ein javnsettur partur í kynsliga sambandinum. Ein hebefilur skemmari kann tó brúka tað lívfrøðiliga sjónarmiðið til at sannføra seg sjálvan um, at hansara kynsligi áhugi og/ella samband er púra vanligt – og ikki snýr seg um ágang.

## KVINNUR KUNNU EISINI SKEMMA

Nakrar kvinnur fremja eisini kynsligan ágang, men tað verður ikki ofta tosað um og sjáldan lagt til merkis. Orsøkin er, at kvinnur í nógv størri mun enn menn sleppa at vera børnunum nær og nerta við tey, uttan at onnur fáa illgruna um ágang. Samstundis hava dreingir, sum eru offur, sera trupult við at viðurkenna ágangin. Teir kenna skuld og hava ilt við at siga frá kvinnuliga skemmaranum. Mentanarliga er tað torførari hjá dreingjum at sameina seg við ein offursamleika, og sannføringin um, at ein kvinna ikki kann fremja ágang móti einum drongi – uttan so at hann sjálvur vil tað – er sera vanlig.

Dømi eru eisini um kvinnur, ið skemma kvinnur – t.d. kvinnuligir samkyndir ítróttarvenjarar, sum hava lokkað eina ella fleiri gentur til kynsliga samveru.

# Eg skuldi taka mær av henni sum ein vaksin maður og nerta við hana á ein uggandi hátt

**Ein uppgerð** frá norskum hagtølum um blóðskemd vísir, at 10% av øllum, sum venda sær til myndugleikan, klagaðu um ágang frá einari kvinnu. Av øllum mannligu ofrunum boðaðu 25% frá, at teir høvdu verið fyri ágangi, ið varð framdur av einari kvinnu. (Bufdir Norge 2010)

## TÁ IÐ BØRN SKEMMA BØRN

Børn og ung kunnu eisini fara um mørk hvør hjá øðrum. Um bæði børnini eru undir 15 ár, er talan ikki um revsiverdan ágang, men tó so kann tað væl vera sálarligur ágangur. Og atburður, sum fer út um mark, kann hava neiligar avleiðingar fyri bæði børnini. Ofta eru børn, sum vísa markleysan atburð, viðkvom, og tey hava javnan ymiska vansorgan í viðførinum. Kanningar benda á harðskap í heiminum sum eina afturvendandi atvold til menningina av kynsliga skemmandi atburði millum børn og ung, og bara 20% av børnum, sum sjálv hava verið fyri kynsligum ágangi, fremja ágang móti øðrum børnum. (Strange 2006)

**Í einari danskari spurnakanning** av 9. floks næmingum søgdu 18% av gentunum og umleið 5% av dreingjunum, at tey høvdu havt óynsktar kynsligar upplivingar saman við javnaldrum. (Unges Trivsel 2008)

## TAÐ BARNSLIGA KYNSLÍVIÐ

Fyri at skilja kynsligan ágang er neyðugt at skilja tað barnsliga kynslívið. Um tú ikki viðurkennir, at børn hava eitt kynslív, kann tað vera torført at skilja, hvussu kynsligur ágangur fer fram uttan likamligan tvingsil og harðskap. Men um tú heldur, at kynslívið hjá barninum er eins og hjá vaksnum fólki, kann tað gerast trupult at skilja stóra sálarløstin, sum kynsligur ágangur móti barninum førir við sær.

Eins og barnasinnið er kynslívið hjá barninum óbúgvið, og menningin av tí er treytað av tí týdningi, sum vit vaksnu leggja í upplivingar hjá barninum gjøgnum uppvøksturin.

Tað óbúna kynslívið vísir seg til dømis í spæli, har tað er ein partur av vanligu royndunum at skilja tey vaksnu og nærkast teimum.

Eins og tað ikki samsvarar við eitt ynski um at fara í kríggj, tá børn spæla hermenn, so samsvarar tað heldur ikki við eitt ynski um at fara í song við monnum, tá lítlar gentur herma eftir tølandi atburði og t.d. vríggja sær sum Britney Spears. Børn eru barnslig og royna at líkjast – uttan nakra djúpari hugsan um kynsligar kenslur – í tí sosiala spælinum, sum tey síggja, at størri børn og vaksin eru í.

Kynsligi ágangurin er ein sálarligur skelkur hjá barninum, tí tað er ikki til reiðar at skilja týdningin av tí – hvørki likamliga ella sosialt. Tað kynsliga sambandið er ein avgerð hjá tí vaksna og bara tí vaksna, og likamliga upplivingin hjá barninum av ágangninum verður eisini stýrd av tí




vaksna. Til dømis kann tann vaksni fortelja barninum, at „hetta er gott“, og at barninum „dámar tað væl“. Tá ið skemmarin á ymsan hátt yvirtalar barnið at halda ágangin loyniligan, hevur barnið ongan møguleika at síggja nakra meining í tí, sum er hent, samanborið við gerandisdagin annars og fatanina av umheiminum sum heild. Haraftur-at sigur skemmarin ofta við barnið, at teirra kynsliga samband er púra vanligt, og tí verður kynsliga sambandið vavt saman við vanligu umsorganini, sum barnið væntar sær frá teimum vaksnu, ið eru rundan um tað.

## KYNSLIGU TANNÁRINGARNIR

Tá ið tosað verður um kynslív hjá børnum og ungum, er ógviliga umráðandi at skilja ímillum tað barnsliga óbúna kynslívið og ta búningina, ið byrjar at førka unglingin ímóti einum vaksnamannakynslívi í tannárunum. Ein av stóru uppgávunum hjá tannáringum er júst at menna sín vaksna – og eisini kynsliga – samleika. Nógvir tannáringar eru kynsliga virknir á ungum árum og hava kynsliga samveru hvør við annan. Tað er ein natúrligur partur av menningini. Men tá ið vit tosa um kynsligan ágang, er eisini neyðugt at hava tað í huga.

Sum sagt, so er munur á pedofila og hebefila ágangunum. Tað hebefila er kynsligur ágangur móti einum barni, ið er undir lógaldur, men í kynsbúningaraldri. Ágangurin er tí ikki lívfrøðiliga frávíkjandi, men má ístaðin greinast út frá sálarligum sjónarhorni. Kanska er barnið, sum er undir lógaldur, longu kynsliga forvitið ella virkið saman við javnaldrunum, og hetta kann skemmarin misbrúka sum prógv um, at kynsliga sambandið ikki er skeivt. Próvgrundin verður styrkt av, at tannáringarnir nú á døgum í stóran mun føra seg fram á kynsliga eggjandi hátt – bæði í atferð, klædnastíli og málburði.

Hesin atburðurin hoyrir til teirra menning og strembanina eftir einum kynsligum samleika. Men hóast tað tykist so, eru tey framvegis ikki kynsliga búgvin. Eitt vaksið fólk, sum hevur kynsligan áhuga fyri einum ómyndigum barni, kann bæði verða villleitt av og gera sær dælt av tí kynsliga eggjandi atburðinum hjá tannáringinum. Skemmarin kann billa sær sjálvum inn, at kynsliga sambandið er javnvigað, men hann kann eisini – fyri at fáa kynsligt samband – samstundis gera sær dælt av, at tannáringurin bæði er óbúgvin og tráar eftir kynsligum royndum.

Í einstøkum førum kann ein tannáringur undir 15 ár hava kynsligt samband við eitt vaksið fólk, uttan at talan er um kynsligan ágang. Serliga um tann vaksni ikki er so gamal, t.d. 20 ár. Tá kunnu báðir partar vera kynsliga og sálarliga javnsettir í kynsliga sambandinum, sum tey ikki uppliva sum ágang. Tá tað snýr seg um tannáringar, er altíð neyðugt við einari meting av einstaka málinum fyri at gera av, um talan er um kynsligan ágang.




## HVÍ HENDIR KYNSLIGUR ÁGANGUR?

Um frágreiðingin var einføld, var trupulleikin lættur at basa. Kynslív er ein umráðandi partur av náttúruni hjá menniskjanum, og kynsligur ágangur hendir eins og annar likamligur og sálarligur ágangur av nógum ymiskum orsøkum:

## EINGIR SKEMMARAR ERU LÍKA

Eins og kynsligur ágangur verður framdur av nógvum ymiskum orsøkum, eru tað eisini nógv ymisk menniskju, sum fremja kynsligan ágang. Hjá summum snýr tað seg um tørvin á nærleika, hjá øðrum stýrir tann kynsligi tørvurin, og uppaftur onnur hava tørv á at hava vald á øðrum menniskjum.

Sálarfrøðin hevur av somu orsøk heldur onga eintýdda mynd av tí eyðkenda kynsliga skemmaranum, men vísir í staðin á ymiskar sálarfrøðiligar og sosialar umstøður, sum kunnu hava sítt at siga í menningini av skemmandi atferð. Tær kunnu vera, at:

- Persónurin er kensluliga óbúgvin
- Hevur lítið sjálvsvirði
- Hevur vánaligar sosialar førleikar
- Er eirindaleysur
- Hevur ilt við at liva seg inn í støðuna hjá øðrum
- Hevur trupult við at fáa innilig og kynslig sambond við onnur vaksin
- Hevur sjálv/ur verið fyri harðskapi og/ella kynsligum ágangi sum barn
- Er fráskild/ur ella uppvaksin við fráskildum foreldrum
- Er arbeiðsleys/ur
- Er bundin av rúsdrekka og/ella øðrum rúsevnum

## EIN SAMFELAGSTRUPULLEIKI?

Samfelagið hevur ikki skyldina av kynsligum ágangi. Men skyldin liggur heldur ikki bara hjá nøkrum „skeivum“ og siðleysum menniskjum. Kynsligur ágangur er eins og annar ágangur eitt syrgiligt úrslit av menniskjaligum sambondum, sum

”

# Tað hendi 10-12 ferðir, frá tí eg var umleið fimm ár, til eg var umleið 10 ár

samfelagið annaðhvørt kann stríðast ímóti ella stuðla. Fyri at verja børn ímóti kynsligum ágangi er tað tí umráðandi at taka hond um tey viðurskifti í okkara samfelag, sum hava ávirkan á økinum. Til dømis at:

- Fáa tamarhald á tabuiseringini kring ágang
- Menna og breiða vitan út um ágang
- Betra undirvísing og upplýsing um kynslív fyri børn og ung
- Hava greiðar mannagongdir, tá ið illgruni er
- Fáa betri møguleikar fyri sálarfrøðiligari ráðgeving og hjálp bæði til offur, skemmarar og avvarðandi
- Fáa tamarhald á netbornum kynsligum ágangi
- Fáa munadyggari hjálp frá landi og kommunum til familjur, har vantrivnaður og harðskapur er

## BØRN Í VANDAØKI

Øll børn kunnu gerast offur fyri kynsligum ágangi, men førleikaveik børn eru í serligum vanda. Børn, sum kanska mangla tryggleika í heiminum, ella sum ongan góðan eiga. Hesi børnini eru serstakliga viðkvom yvir fyri tí sambandi og umsorgan, sum tann vaksni skemmarin brúkar til at fáa kynsligt samband, og tey eru lættari at villleiða við lygnum og hóttanum. Samstundis kann tað verða trupult hjá kringumstøðunum at varnast, um eitt førleikaveikt barn er offur fyri kynsligum ágangi, tí tað sæst ikki aftur millum teir týðiligaru trupulleikarnar, til dømis um annað av foreldrunum er bundið av rúsdrekka.

## MENNINGARTARNAÐ

Tey seinastu árini er við jøvnum millumbilum varpað ljós á, at børn og ung við menningartarni eru í serligum vanda, tá talan er um kynsligan ágang. Tíverri er ikki nógv granskað í Danmark innan økið, men fleiri útlendskar kanningar vísa, at børn og ung við menningartarni eru í tvær til tríggjar ferðir størri vanda fyri at verða fyri kynsligum ágangi enn børn og ung við ongum menningartarni. Børn og ung við menningartarni eru bæði fyri ágangi frá øðrum við menningartarni og eisini frá umsorganarpersónum, t.d. familju og røktarstarvsfólki. Børn og ung við menningartarni eru ofta viðkvæmari fyri ágangi, bæði tí tey eru bundin av at laga seg eftir teimum, sum stuðla tey ella ansa teimum, og tí at tey vegna sítt menningartarn kunnu hava truplari við at skilja ella siga øðrum frá áganginum. Ofta verða tekin um vantrivnað sett í samband við menningartarnið hjá barninum, og tí kann illgruni um kynsligan ágang lættari skúgvast til viks.

## OKKARA LÍTLA LOYNDARMÁL

Tað kann vera torført at skilja, hvussu kynsligi ágangurin kann fara fram, uttan at nakar varnast hann, og uttan at ofrið sigur nøkrum frá. ‘Grooming’ er eitt lutfalsliga nýtt hugtak, sum lýsir part av frágreiðingini. ‘Grooming’ er tann villleiðandi tilevningin av sambandinum, sum skemmarin snikkar til frammanundan, undir og eftir ágangin. Ein týdningarmikil liður í ‘groomingini’ er, at skemmarin gevur ofrinum skuldarkenslur av áganginum og fær tað at skammast.

## STIG Í ‘GROOMINGINI’

**1. At velja burturúr:** Skemmarin knýtir eitt innleiðandi samband við ofrið. Sambandið kann hava verið frammanundan ella henda av tilvild. Ein ógviliga miðvísur skemmari kann eisini taka stig til at fáa samband við eitt barn gjøgnum sjálvboðið arbeiði, arbeiði í einum ítróttarfelagi ella gjøgnum alnetið. Nógvir skemmarar siga, at teir hava havt lætt við at fáa eyga á viðbrekin børn.

**2. Vinalag og álit:** Skemmarin knýtir eitt gott og jaligt samband við barnið. Hann kann átaka sær leiklutin sum tannn vaksni, ið er umhugsin, umsorganarfullur, lurtar, uggar og stuðlar, og soleiðis kann hann fáa stóran týdning í lívinum hjá barninum.

# ”Mín heimur fór í sor, tí mín heimsmynd, myndin av mínum barnaheimi og av pápa mínum sorlaðist sundur

**3. Krøv:** Tá ið ein tíð er liðin, fer skemmarin so við og við at seta krøv til, at barnið skal gera okkurt aftur fyri ta umsorgan, tann vaksni hevur givið tí. Krøv, ið kunnu tykjast rímilig í fyrstani, men sum stig fyri stig gerast meira og meira kynslig. Serkent er, at skemmarin hóttir barnið við, at vinalagið ella aðrir fyrimunir, ið barnið fær frá skemmaranum, verða tikin frá tí. Í summum førum verða pornografiskar myndir av børnum eisini nýttar fyri at sannføra barnið um, at kynsligt samband millum børn og vaksin er púra vanligt.

**4. Eftir fyrsta ágangin:** Skemmarin krevur, at barnið tigur um ágangin: „Hetta er okkara lítla loyndarmál.“ Skemmarin kann eisini hótta við avleiðingum, um barnið hugsar um at boða frá. Tað kann vera hóttanir um, at bæði verða sett í geglið, ella at mamman at barninum verður dripin. Skemmarin kann orða seg á ein hátt, sum fær barnið at kenna bæði skuld og ábyrgd av áganginum. Skemmarin leggur dent á, at gerðin var sjálvboðin: „Tú vildi tað, sum hendi í gjár og eisini í síðstu viku. Eg haldi, at tær dámar tað!“

**5. ‘Grooming’ av umhvørvinum:** Tað er eisini neyðugt hjá skemmaranum at skaffa sær eitt frírúm og fráveruprógv til tey, ið eru rundanum. Skemmarin kann t.d. nýta tey ymisku tekini um vantrivnað hjá barninum sum undanførslu fyri at vera eyka umsorganarfullur og soleiðis tykjast at vera eitt sera umhugsið og álitisvekjandi vaksið fólk.

## EITT FET Á RÆTTARI LEIÐ

Fyribyrging er sterkasta vápnið í stríðnum móti kynsligum ágangi. Øll vaksin, sum í gerandisdegnum eru um børn og ung, mugu vera við í tí fyribyrgjandi arbeiðnum. Um tú hevur lisið hetta upplýsingartilfarið, hevur tú longu tikið fyrsta stigið á rættari leið. Meiri vitan og vaksandi gætur um hetta nívandi evnið fer ikki bara at gera tað lættari at geva sær far um kynsligan ágang, men eisini at gera tað truplari hjá møguligum skemmarum at fremja kynsligan ágang.

**Tað er revsivert at villleiða eitt barn** við tí fyri eyga at misbrúka tað kynsliga – eisini um barnið ikki verður misbrúkt. Í 2009 varð fyrsta dómsmálið felt, har ein 73 ára gamal maður fekk ein mánaðar treytaleysa og tveir mánaða treytaða fongsulsrevsing fyri ‘grooming’ av einari 13 ára gamlari gentu á alnetinum. Hann var møtti upp fyri at misnýta 13 ára gomlu gentuna, men tað vísti seg, at unga gentan í veruleikanum var ein vaksin tíðindakvinna, sum hevði arbeitt „undercover“ í meira enn eitt ár við at avdúka kynsskemmarar á alnetinum. Dómurin sendir eitt umráðandi tekin til møguligar skemmarar, sum royna at fáa samband við børn á alnetinum. Red Barnet hevur í fleiri ár talað fyri, at „ávegis grooming“, t.e. roynd hjá vaksnum at lokka og villleiða børn til kynsligt samband, eisini skal vera revsiverd.



Men talan er sjálvandi um eina hárfína javnvág. Tí tað er umráðandi, at foreldur og fakfólk ikki síggja kynsligan ágang allastaðni og skapa misálit kring øll tøtt sambond millum børn og vaksin. Hóast nógva vitan á økinum er altíð torført at meta um, hvørt tekin um vantrivnað ella frávíkjandi atburður eru tekin um kynsligan ágang. Og ein má vera varin, tí skeivar skuldsetingar kunnu hava ógvusligar avleiðingar fyri allar partar.

Tann besti mátin at fyribyrgja kynsligum ágangi er við at skapa eitt umhvørvi kring børn, ung og vaksin, har tosað verður opið og erliga um torfør evni. Í einum tílíkum umhvørvi trívast kynsligur ágangur og onnur sløg av vantrivnaði nevniliga illa.

## GÓÐ RÁÐ TIL TÍN, SUM ERT UM BØRN OG UNG

- Ver saman við børnunum og teimum ungu og vís teimum, at tú hevur veruligan áhuga fyri teimum, teirra heimi, hugskotum og kenslum.
- Skapa eitt huglag í familju, á stovni o.s.fr., har øll kunnu tosa opið um kenslur, um nakar er keddur, ella um onkur hevur borið seg ljótt at.
- Lær børnini og tey ungu at seta mørk og at virða mørkini hjá øðrum – bæði likamliga og sálarliga. Vís sjálv/ur virðing fyri teirra kroppi og teirra mørkum viðvíkjandi nerting.
- Lær børn og ung at siga frá tí, sum ger tey ótrygg ella bangin. Knýt eitt netverk, har tey kenna seg trygg bæði í heiminum og uttan fyri heimið.
- Tosa við børn og ung um munin á góðum og ringum loyndarmálum.
- Vís dirvi til at hava samrøðuna saman við øðrum vaksnum um, hvat eigur at gerast, um okkurt er áfatt, sum ikki kann góðtakast.
- Tosa við børn og ung um teirra gerandisdag og tað, tey uppliva. Børn og ung skulu ikki noyðast at greiða frá øllum, tey gera. Men um tú vísir áhuga og opinleika uttan at vera átrokandi, er størri møguleiki fyri, at tey siga frá neiligum upplivingum sum til dømis markleysum atburði.
- Vís áhuga og tosa við børn um tann heimin, tey reika um á alnetinum. Tosa bæði um møguleikarnar og fellurnar – t.d. um hvat kann henda, um barnið leggur myndir av sær sjálvum ella persónligar upplýsingar út, so sum telefonnummar og bústað.



## HER KANST TÚ FÁA HJÁLP OG RÁÐGEVING Í FØROYUM

**BARNABATI:** tlf. 522011 & 532011 • www.barnabati.fo

**BARNAVERNDARSTOVA FØROYA:** tlf. 302480 • bvs@bvs.fo • www.bvs.fo

**BARNAVERNDARTÆNASTAN Í TÍNUM ØKI** • sí yvirlit á www.bvs.fo

**BUM – BARNANNA UMBOÐSMAÐUR:** tlf. 358500 • www.bum@bum.fo • www.bum.fo

**GIGNI:** tlf. 562300 • gigni@gigni.fo • www.gigni.fo

**KOMMUNULÆKNIN Í TÍNUM ØKI** • sí yvirlit á www.@heilsutrygd.fo

**KRIS:** tlf. 448181 • kris@kris.fo • www.kris.fo

**KVINNUHÚSIÐ:** tlf. 317200 • post@kvinnuhusid.fo • www.kvinnuhusid.fo

**LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, PSYKIATRISKI DEPILIN:** tlf. 304500 • ls@ls.fo • www.ls.fo

**LØGREGLAN:** tlf. 351448 • politi@politi.fo

**RÆTTARHJÁLP FØROYA:** tlf. 319823 • post@raettarhjalpin.fo • www.raettarhjalpin.fo

**SERNÁM:** tlf. 360200 • sernam@sernam.fo • www.sernam.fo

KRIS | RÁÐGEVING FYRI SEKSUELT MISBRÚKT

Red Barnet